Okkum vantar vinnuliga gransking í Føroyum

Samskiparin í Ráfiskarakeyparafelagnum, Agnar Jensen, tekur undir við teimum, ið halda, at tørvur er fyri einum granskingarstovni innan fiskivinnuna í Føroyum. Honum dámar væl skipanina við Seafish, men hann vil kortini ikki leggja avgjald á vinnuna til ein slíkan stovn. Agnar Jensen heldur, at peningurin er at finna í systeminum, sum hann málber seg.

Fleiri umboð fyri føroysku fiskivinnuna á landi og sjógvi eru hugtikin av arbeiðinum hjá enska stovninum, Seafish, sum er í Føroyum í hesum døgum, og kunnar seg um føroyska fiskivinnu, og vilja hava ein líknandi granskingarstovn í Føroyum

Mynd: Jens Kristian Vang

GRANSKING Í FØROYUM

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin

Í blaðnum í gjár førdu Rói Egholm, ið arbeiðir á fiskasøluni Farex, og John Rajani, ið arbeiðir á føroysku sendistovuni í London, fram, at stórur tørvur er á einum granskingarstovni innan fiskivinnuna. Í hesum døgum er ein enskur granskingarstovnur, ið kallast Seafish, og vitjar oyggjarnar.

Endamálið hjá Seafish er at arbeiða fyri, at enska fiskivinnan mennist alla tíð. Í tí sambandi er stovnurin í Føroyum í hesum døgum, og kunnar seg um føroysku fiskivinnuna. Fleiri umboð fyri føroysku fiskivinnuna á landi og sjógvi eru hugtikin av arbeiðinum hjá enska stovninum, og kundu hugsa sær ein líknandi stovn í Føroyum.

Rói Egholm helt í blaðnum í gjár, at tað er sera undrunarvert, at onglendingar kunnu lata 120 milliónir krónur til fiskivinnugransking, meðan føroyingar ikki lata eina krónu. Hevur ein fyri eyga, at fiskivinnan svarar til meginpartin av vinnuvirkseminum í Føroyum, meðan fiskivinnan í Onglandi ikki svarar til meir enn gott 1% av samlaðu ensku vinnuni, so er raðfestingin undrunarverd, helt Rói Egholm fyri.

Skipanin við Seafish skilagóð

Agnar Jensen, ið er samskipari hjá Ráfiskarakeyparafelagnum, sigur, at tað er kanska í so nógv gjørt av, tá fort verður fram, at eingin fiskiídnaðargransking, sum bæði arbeiða við gransking í fiskivinnuni burturav. Teirra øki fevna tó serliga um tað lívfrøðiliga, reiðskap og framleiðslu á landi, og møguliga kemur tað búskaparliga øki ikki nóg væl við, greiðir Agnar Jensen frá.

Hann er fullkomiliga samdur í, at serliga vinnuliga granskingin í Føroyum er við skerdan lut. Fyri at betra um granskingarviðurskiftini, heldur Agnar, at vit áttu at nýtt eina líknandi skipan sum onglendingar hava við Seafish.

– Modellið við Seafish er gott, tí stovnurin tekur sær av vinnuligari gransking, og tað mangla vit í Føroyum. Eg gangi kortini ikki við til, at avgjald verður lagt á vinnuna til ein slíkan stovn, sigur samskiparin í Ráfiskarakeyparafelagnum.

Fíggingin við Seafish er skipað so, at enska fiskivinnan sjálv letur 8 milliónir krónur til stovnin árliga. Fíggingin kemur í lag við, at bátarnir lata eitt ávísa upphædd fyri hvørt kilo, sum verður fiskað. Tær írestandi 30 milliónirnar koma við stuðli, millum annað frá ES.

Spurdur, um hvussu ein granskingarstovnur í Føroyum annars skal fíggjast, um avgjald eins í Onglandi ikki verður lagt á vinnuna, svarar Agnar, at eftir hansara meting er nóg mikið av peningi til ein granskingarstovn í systeminum, sum hann málber seg.

- Vit kunnu byrja í smáum, og eingin sigur, at tað skal verða ein fastur stovnur alt fyri eitt. Í løtuni eru fleiri ymiskar stovnar í Føroyum, ið granska í fiskivinnuni, og tað átti at borið til at byrja við at fáa hesar stovnar at tosa saman, so granskingin í fiskivinnuni kann samansjóðast, sigur Agnar Jensen.

Agnar Jensen leggur at enda dent á, at tað má vera vinnan sjálv, sum kemur at stýra einum slíkum stovni, og ikki politiski myndugleikin.

Fiskimálaráðið um granskingarstovn:

Vinnan má sjálv koma við uppskoti

Marita Rasmussen sigur vegna Fiskimálaráðið, at um vinnan veruliga ynskir ein stovn sum Seafish, má hon sjálv koma einum uppskoti um, hvussu ein slíkur stovnur skal skipast. Fiskimálaráðið er sjálvsagt áhugað í, at vera við í arbeiðinum um ein slíkan stovn, sigur Marita Rasmussen

GRANSKING Í FØROYUM

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Fiskimálaráðið sigur, at um vinnan veruliga ynskir ein stovn sum Seafish í Føroyum, so má hon sjálv koma við einum uppskoti, og tá er Fiskimálaráðið sjálvsagt ahugað í, at hyggja nærri at møguleikunum saman við vinnuni

Fólk á Fiskimálaráðnum siga seg vera áhugað at vera við í arbeiðinum at seta ein stovn sum Seafish á stovn, um vinnan sjálv ynskir at fáa ein stovn eftir tí leistinum. Spurd um hví eingin samfelagslig gransking innan fiskivinnuna hevur vunnið frama áður í Føroyum, svarar Marita Rasmussen fyri Fiskimálaráðið, at tað helst er siðvenjan í Føroyum.

Hon vísir á, at í øðrum londum er siðvenja at granska nógv í fiskivinnuni, men hetta hevur ikki verið galdandi í Føroyum í eins stóran mun.

- Arbeiðið hjá Seafish vil eg ikki kalla gransking, men meira kunning, tí stovnurin kemur ikki við nakrari nýggjari vitan, men heldur er talan um ymiskar staðfestingar í ensku fiskivinuni, sigur Marita Rasmussen.

Hon vísir á, at í løtuni verða góðar 12 milliónir játtaðar til Fiskivinnuroyndir, ið granskar í fiskivinnuni, men Fiskiroyndir granskar í øðrum økjum enn Seafish ger. – Frá landsins síðu verður meira satsa uppá gransking enn kunning, sigur Marita Rasmussen.

Marita leggur dent á, at í høvuðsheitum er enski stovnurin fíggjaður privat, og tískil eigur vinnan sjálv í Føroyum koma við uppskoti um ein slíkan stovn, um tey ynskja tað. – Fiskimálaráði er sjálvsagt áhugað í at hyggja nærri at einum líknandi stovni saman við vinnuni, um vinnan veruliga ynskir tað, sigur Marita Rasmussen at enda.

Ferðslutiltak fyri børn í Gøtu

Komandi hósdag skipa Ráðið fyri Ferðslutrygd, Dagstovnurin og dagrøktin í Gøtu kommunu fyri ferðslutiltaki fyri børn og foreldur í ítróttarhøllini á Kambsdali

FERÐSLUTILTAK

Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Børn í Gøtu kommunu hava frá felagnum, Kiwanis, fingið vestar við endurskini. Vestarnir skulu nýtast, tá børnini eru túrar til gongu.

Umframt vestar fáa tey eisini farteldu at nýta til venjingar við teimum børnum, sum bera brek ella hava serligan tørv.

Í tí sambandinum skipa Ráðið fyri Ferðslutrygd, Dagstovnurin og dagrøktin í Gøtu kommunu fyri ferðlutiltaki í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Tiltakið verður hósdagin tann 2. oktober klokkan 17.30 til 19.30.

Øl er gott

Summi hava eitt arbeiði, sum man ikki kann annað enn øvunda teimum eitt sindur. Ein av hesum er Leif Typkær, bryggimeistari, hvørs dagliga starv er at læra frá sær um hvussu man nýtur eina øl ella tvær. Herfyri var hann í Vertshúsinum og boðaði sín boðskap.
Sosialurin var við fyri at læra

ØL

Orð: Rúnar Reistrup
Myndir: Finnur Justinussen

Ein øl er ikki bara ein øl. Tað hevði danski bryggimeistarin Leif Typkær sett sær fyri at trútta niður í okkum hálvtrýss sálir, sum herfyri høvdu sett eitt fríggjakvøld av til at læra eitt sindur um øl, og nú sótu í kjallaranum í Vertshúsinum í Havn.

Leif Typkær stendur á odda fyri einum bryggimeistaraliði, sum donsku bryggjariini í felag settu á stovn fyri nøkrum árum síðan. Hetta bryggimeistaraliðið hevur sum einastu uppgávu læra danir meira um øl - og harvið fáa danir at drekka meira øl.

Tí ølsølan í Danmark minkar støðugt, og tað hevur hon gjørt í skjótt tíggju ár. Danir eru farnir at venda sínum tjóðardrykki bakið til frama fyri vatn og vín, og tað halda bryggjariini av ymsum orsøkum vera spell. Bryggimeistaraliðið hevur tí fingið sum uppgávu at fáa ølið aftur á donsku spísiborðini og stuðla uppundir góða ølmentan.

- Góð ølmentan er at drekka nógv, men ikki ov ofta, sigur Leif Typkær.

Bryggimeistarin hevur eisini heft seg við, at bæði bryggjariini í landinum hava tikið sær um reiggj og hava roynt seg við fleiri nýggjum sløgum av øli.

- Tað eru komnar fleiri nýggjar og spennandi føroyskar øl, síðan eg var her seinast, og tað er at fegnast um. Tí ymiskt øl passar væl til ymiskan mat. Pilsnarølin, har føroyingar leingi hava havt Veðrin hjá Føroya Bjór og nú eisini hava Pilsnaran hjá Restorffs, er góður til ein nátturða og sløkkir annars tostan væl. Tað myrkara ølið, eitt nú Vargurin hjá Restorffs og Classic ella Black Sheep frá Føroya Bjór, er hinvegin betri til kjøtrættir, meðan ljóst gulløl egnar seg sera væl til feitan fisk. Tí er tað umráðandi fyri eina góða ølmentan at hava fleiri sløg av øli, sigur bryggimeistarin, sum undir fyrilestri sínum gjørdi nógv burturúr at lýsa munin millum tey ymisku ølsløgini, bæði í framleiðslu og smakki.

Sprittbeltið

Men meðan bryggimeistarin hevur rætt í at vit hava fingið fleiri sløg av føroyskum øli, so kunnu tey útlendsku ølsløgini, ið fáast til keyps í Føroyum, enn sum áður teljast á einari hond. Og hóast tær bestu føroysku ølirnar eru góðar, eisini sammett við útlendskt øl, so stendur ikki serliga væl til við ølúrvalinum her í landinum.

Tað kann Rúsdrekkasøla Landsins helst lættliga taka alla æru fyri.

Ein skjót gjøgnumgongd av úrvalinum har avdúkar, at tað eru væl fleiri útlendsk vodkasløg enn útlendsk ølsløg á hillunum í landsins annars rættiliga dygdargóðu Rúsdrekkasølum. Og tað er kanska ikki so løgið sum tað ljóðar.

Í fyrilestri sínum segði Leif Typkær frá síni hugsan um, hvussu ymiska rávørutilfeingið í Europa hevur sett sín týðuliga dám á drykkjumentanina í einstøku londunum.

- Í Suðureuropa eru góðar umstøður at dyrka drúvur, og har drekka tey tískil mest vín. Tí kunnu vit kalla hetta fyri vínbeltið. Longur norðuri vaksa fáar drúvur men nógv bygg, og her verður tí mest drukkið av øli. Vit kunnu kalla tað fyri ølbeltið. Longur norðuri veksa ongar rávørur, so har verður man noyddur at destillera og drekka brennivín, og tí kunnu vit kalla hendan partin fyri sprittbeltið, helt bryggimeistarin skemtandi fyri undir fyrilestrinum.

Hetta kvøldið stóð hann mitt í sprittbeltinum og royndi at læra frá sær um øl og ølmentan.

Ein greiður vinnari

Hóast tað var Restorffs Bryggjari, sum hevði tikið stig til at fáa danska bryggimeistaran til Føroya, og karmurin um hetta forkunnuga tiltak var Vertshúsið hjá sama reiðarii, vóru ongar føroyskar øl smakkiroyndar.

Við sær til Føroya hevði danski bryggimeistarin nevniliga sjálvur tikið nøkur og fjøruti ymisk sløg av donskum øli til smakkingar. Ætlanin var, at bryggimeistarin skuldi hava yvir tríss sløg av øli við, men føroyska rúsdrekkalógin loyvdi ikki innflutningi av teimum sterkastu ølunum. Tað gjørdi kanska ikki so nógv, tí ein lóg er nú einaferð ein lóg, og fjøruti øl eru ivaleyst til eitt fríggjakvøld.

Men hvør var so tann besta ølin av hesum fjøruti donsku ølunum úr veikara endanum? Undirritaðu vóru ikki í iva, Rød Classic hjá Albani bryggjarínum í Odense var munandi betri enn hinar. Hon er heilt nýggj á marknaðinum, var fyrstu ferð at síggja á hillunum í Danmark 5. september í ár og verður neyvan nakrantíð at síggja á hillunum í Føroyum.